Almannamálaráðið

Dagfesting:	22. februar 2021
Mál nr.:	21/00769
Málsviðgjørt:	PL
Ummælisfreist:	N/A
Eftirkannað:	04. februar 2021

Uppskot til

Løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um barnavernd (Barnaverndarlógin)
(Ferðaútreiðslur sum standast av samveru í sambandi við uppihald á stovni uttanlands)

§ 1

Í løgtingslóg nr. 18 frá 8. mars 2005 um barnavernd (Barnaverndarlógin), sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 166 frá 12. desember 2020 verður § 22, stk. 8 orðað soleiðis:

"*Stk. 8*. Barnaverndartænastan ber, eftir umbøn, ferðaútreiðslurnar í sambandi við samveru innanlands. Landið ber ferðaútreiðslurnar sum standast av samveru í sambandi við uppihald á stovni uttanlands."

§ 2

Henda løgtingslóg kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd og hevur virknað frá 14. desember 2020.

Kapittul 1. Almennar viðmerkingar

1.1. Orsakir til uppskotið

Løgtingsins umboðsmaður staðfesti í frágreiðing frá apríl mánað 2020, at ongin greið heimild er í barnaverndarlógini hjá Barnaverndartænastunum at gjalda foreldrum fyri ferðaútreiðslur í sambandi við samveru eftir barnaverndarlógini, og heitti í hesum sambandi á Almannamálaráðið um at fáa til vegar hesa heimild.

Uppskot til broyting í barnaverndarlógini varð lagt fyri Løgtingið á heysti í 2020, og uppskotið varð lagt fram 4. november. Upprunauppskotið var soljóðandi:

> "Stk. 8. Barnaverndartænastan ber ferðaútreiðslurnar í sambandi við samveru, um foreldrini ikki sjálvi megna at halda hesar útreiðslur."

Í sambandi við tingviðgerðina av uppskotinum, hevði Barnaverndarstova Føroya ynski um, at orðingin bleiv broytt, soleiðis at tørvsmetingin varð tikin úr tekstinum, tí mett varð, at skipanin fór at gerast ov krevjandi umsitingarliga, og at heimild ístaðin varð hjá barnaverndartænastunum at rinda øllum foreldrum eftir frammanundan ásettum taksti.
Trivnaðarnevndin valdi at ganga hesi umbøn á møti og broytti orðingina í uppskotinum til soljóðandi, sum eisini varð samtykt í Løgtinginum 11. desember 2020:

> "**§ 22**, stk. 8. Barnaverndartænastan ber, eftir umbøn, ferðaútreiðslurnar í sambandi við samveru innanlands. Barnaverndartænastan ber ferðaútreiðslurnar í sambandi við samveru uttanlands, um foreldrini ikki sjálvi megna at halda hesar útreiðslur."

Fíggingin av barnaverndarøkinum er – eins og umsitingin – býtt millum land og kommunur. Kommunurnar halda sambært § 68 í barnaverndarlógini útreiðslurnar, ið standast av lógini, tó undantikið útreiðslur, ið standast av § 69, stk. 1. Sambært § 69, stk. 1 heldur landið m.a. útreiðslurnar fyri stovnspláss uttanlands. Fyri at fáa nærri greiði á, hvørjar útreiðslur landið heldur í hesum sambandi er gjørd "Leiðbeining um hvørjar útreiðslur landið heldur í sambandi við uppihald á stovni uttanlands eftir § 35, stk. 2 í barnaverndarlógini". Sambært hesi leiðbeining heldur landið tær útreiðslur, ið standast av, at barnið má á stovn uttanlands, og ikki bert fyri sjálvt stovnsuppihaldið uttanlands. Hetta tí at útreiðslurnar standast av, at einki nøktandi tilboð er í Føroyum, sum landsstýrismaðurin hevur ábyrgdina av. Ásett verður í hesum sambandi, at landið heldur ferðaútreiðslurnar til barnið í sambandi við samveru í Føroyum. Gera serligar umstøður, at barnið ikki kann koma til Føroya til samveru, og samvera tískil bert kann skipast, við at foreldrini fara uttanlands til samveru, heldur landið ferðaútreiðslurnar hjá foreldrunum.

Talan er sostatt um, at í sambandi við samveru við barn, sum er búsitandi á stovni uttanlands, so er tað landið, sum heldur útreiðslurnar, og ikki barnaverndartænastan. Tá uppskotið til broyting í barnaverndarlógini varð broytt undir tingviðgerðini, varð Almannamálaráðið tíverri ikki varugt við, at nýggja orðingin var í andsøgn við ásetingina í § 69, stk. 1 í barnaverndarlógini og tulkingina í omanfyri nevndu leiðbeining.

Ætlanin hevur ikki verið at gera broytingar í galdandi rættarstøðu hesum viðvíkjandi, og tí verður ásetingin broytt aftur til áður galdandi rættarstøðu. Við broytingini verður greitt ásett, at tað er barnaverndartænastan, ið heldur ferðaútreiðslurnar í sambandi við samveru innanlands, meðan tað er landið, sum ber ferðaútreiðslurnar sum standast av samveru í

sambandi við uppihald á stovni uttanlands. Orðingin um, at ferðaútreiðslur verða goldnar, um foreldrini ikki sjálvi megna hesa útreiðslu, verður strikað, tí sambært omanfyri nevndu leiðbeining so heldur landið ferðaútreiðslurnar uttan mun til, um foreldur megna hesar ella ikki, tó í mesta lagi fyri ta samveru, sum er ásett av Høvuðsbarnaverndarnevndini.

1.2. Galdandi lóggáva
Sambært galdandi lóggávu er tað barnaverndartænastan, ið rindar ferðaútreiðslur í sambandi við samveru uttanlands. Av misgáum er orðingin í § 22, stk. 8 í andsøgn við galdandi rættarstøðu á økinum, sum ætlanin ikki hevur verið at broyta. Víst verður til viðmerkingarnar í pkt. 1.2.

1.3. Endamálið við uppskotinum
Endamálið er at rætta orðingina í § 22, stk. 8, so at rættarstøðan er hin sama sum var galdandi áðrenn lógarbroytingina í løgtingslóg nr. 166 frá 12. desember 2020.

1.4. Samandráttur av nýskipanini við uppskotinum
Við lógarbroytingini verður uppgávu- og ábyrgdarbýti millum land og kommunur í sambandi við rindan av ferðaútreiðslum í sambandi við samveru greitt ásett, soleiðis at kommunurnar rinda fyri ferðaútreiðslur í sambandi við samveru innanlands, meðan landið rindar ferðaútreiðslur í sambandi við samveru, tá barn er á stovni uttanlands.

1.5. Ummæli og ummælisskjal
Talan er um tøkniliga broyting, og tí hevur uppskotið ikki verið til ummælis. Almannamálaráðið hevur verið í samskifti við Barnaverndarstovu Føroya og Almannaverkið um broytingina.

Kapittul 2. Avleiðingarnar av uppskotinum

2.1. Fíggjarligar avleiðingar fyri land og kommunur
Lógaruppskotið hevur ikki fíggjarligar avleiðingar fyri land og kommunur. Tó at tað verður ásett, hvør ber ferðaútreiðslurnar í sambandi við samveru, tá barn er á stovni uttanlands, so er talan bert um at broyta lógina soleiðis at tað framvegis er landið, sum ber hesar útreiðslur.

2.2. Umsitingarligar avleiðingar fyri land og kommunur
Lógaruppskotið hevur ikki umsitingarligar avleiðingar fyri land og kommunur.

2.3. Avleiðingar fyri vinnuna
Uppskotið hevur ikki avleiðingar fyri vinnuna.

2.4. Avleiðingar fyri umhvørvið
Lógaruppskotið hevur ikki avleiðingar fyri umhvørvið.

2.5. Avleiðingar fyri serstøk øki í landinum
Lógaruppskotið hevur ikki avleiðingar fyri serstøk øki í landinum.

2.6. Avleiðingar fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir
Lógaruppskotið hevur ikki avleiðingar fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir.

2.7. Millumtjóðasáttmálar á økinum
Ongir millumtjóðasáttmálar eru á økinum, ið lógaruppskotið hevur ávirkan á.

2.8. Tvørgangandi millumtjóðasáttmálar
Lógaruppskotið sampakkar við Hoyvíkssáttmálan, Evropeiska mannarættindasáttmálan og Sáttmála Sameindu Tjóða um rættindini hjá einstaklingum, ið bera brek.

2.9. Markaforðingar
Ongar kendar markaforðingar eru á økinum.

2.10. Revsing, fyrisitingarligar sektir, pantiheimildir ella onnur størri inntriv
Lógaruppskotið hevur ikki ásetingar um revsing, fyrisitingarligar sektir, pantiheimildir ella onnur størri inntriv.

2.11. Skattir og avgjøld
Lógaruppskotið hevur ikki ásetingar um skattir og avgjøld.

2.12. Gjøld
Lógaruppskotið hevur ikki ásetingar um gjøld.

2.13. Áleggur lógaruppskotið likamligum ella løgfrøðiligum persónum skyldur?
Lógaruppskotið áleggur ikki likamligum ella løgfrøðiligum persónum skyldur.

2.14. Leggur lógaruppskotið heimildir til landsstýrismannin, ein stovn undir landsstýrinum ella til kommunur?
Lógaruppskotið leggur ikki heimildir til landsstýrismannin, ein stovn undir landsstýrinum ella til kommunurnar.

2.15. Gevur lógaruppskotið almennum myndugleikum atgongd til privata ogn?
Lógaruppskotið gevur ikki almennum myndugleikum atgongd til privata ogn.

2.16. Hevur lógaruppskotið aðrar avleiðingar?
Lógaruppskotið hevur ikki aðrar avleiðingar.

2.17. Talvan: Yvirlit yvir avleiðingarnar av lógaruppskotinum

	Fyri landið ella landsmyndug-leikar	Fyri kommunalar myndugleikar	Fyri pláss ella øki í landinum	Fyri ávísar samfelags-bólkar ella felagsskapir	Fyri vinnuna
Fíggjarligar ella búskaparligar avleiðingar	Nei	Nei	Nei	Nei	Nei
Umsitingarligar avleiðingar	Nei	Nei	Nei	Nei	Nei
Umhvørvisligar avleiðingar	Nei	Nei	Nei	Nei	Nei
Avleiðingar í mun til altjóða avtalur og reglur	Nei	Nei	Nei	Nei	Nei
Sosialar avleiðingar			Nei	Nei	

Kapittul 3. Serligar viðmerkingar

3.1. Viðmerkingar til ta einstøku greinina

Til § 1
Orðingin í § 22, stk. 8 verður broytt, soleiðis at tað greitt framgongur, at barnaverndartænasturnar halda ferðaútreiðslurnar í sambandi við samveru innanlands, meðan tað er landið, sum heldur ferðaútreiðslurnar sum standast av samveru í sambandi við uppihald á stovni uttanlands sambært reglunum í leiðbeining um hvørjar útreiðslur landið heldur í sambandi við uppihald á stovni uttanlands eftir § 35, stk. 2 í barnaverndarlógini.

Til § 2
Av tí at ætlanin ikki hevur verið at gera broytingar í rættarstøðuni, verður ásett, at lógin hevur virknað frá tí degi, tá løgtingslóg nr. 166 frá 12. desember 2020 kom í gildi.

Almannamálaráðið, 22. februar 2021

Elsebeth Mercedis Gunnleygsdóttur
landsstýrismaður

/ Eyðun Mohr Hansen

Yvirlit yvir fylgiskjøl:
Fylgiskjal 1: Javntekstur